# Føðingar



*Hey hey øll somul! Eg varð føddur 9. mai. Eg vigaði 3800 gr og var 56 cm langur. Foreldur míni eru Joan Kjærbo, Klaksvík og Bárður K. Hansen, Funningsfjørður*

24. mai fingu Inga Thorkildshøj, Tórshavn, og Eli Müller, Vestmanna, ein son. Hann var 57 cm langur og vigaði 5050 gr.

24. mai fingu Tóra og Hans Toftegaard, Fuglafirði, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3600 gr.

25. mai fingu Joan H. Poulsen og Rasmus Frølund, Vági, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3320 gr.

28. mai fingu Arna F. Olsen, Rituvík, og Bogi F. Christiansen, Leirvík, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3650 gr.

28. mai fingu Ingun W. Jacobsen og Óli Ei Simonsen, Tórshavn, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3185 gr.

29. mai fingu Beinta Karbech og Poul Andreas Hansen, Skála, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 4050 gr.

29. mai fingu Inger Smærup Sørensen og Øssur Winthereig, Tórshavn, ein son. Hann var 58 cm langur og vigaði 4120 gr.

30. mai fingu Ragna Juul og Yasmani Suarez, Århus, eina dóttur. Hon vigaði 2000 g og var 47 cm long.

## Gullbrúdleyp

Fríggjadagin 1. juni hava Elin og Poul Johannes Poulsen, Ljósá, gullbrúdleyp. Veitsla verður fyri innbodnum í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 18.00.

## 90 ára føðingardagur

Mánadagin 11. juni fyllir Sámal Patursson í Kirkjubø 90 ár. Dagurin verður hildin leygardagin 9. juni frá kl. 11 til 15 hjá Ásu og Svein, Varðabúð 9, Tórshavn.

## 85 ára føðingardagur

Mánadagin 4. juni 2007 verður Oleva Hansen í Leynum 85 ár. Føðingardagurin verður hildin við vælkomst frá kl. 18.30 í neystinum hjá Argja Róðrarfelag.

## 85 ára føðingardagur

Mánadagin 4. juni fyllir Maria í Skorini (Mia á Dul) 85 ár. Mia verður burturstødd føðingardagin.

## 80 ára føðingardagur

Mánadagin 4. juni verður Hansa Petersen í Oyndarfirði 80 ár. Dagurin verður hildin við døgurða sunnudagin 3. juni kl. 14.00 í hølinum hjá ítróttarfelagnum í Oyndarfirði. Øll eru hjartaliga vælkomin.

## 70 ára føðingardagur

8 juni og 21 juli fylla Eiler og Hergerð Samuelsen Klaksvík 70 ár. Tey halda føðingardagarnar 8. juni heima Við Mylnutún 9 fra kl 18.

**Prógv**

Eyðdis Eystberg Johannesen, dóttir Steingrím og Elisabeth Johannesen úr Skopun, búsitandi i Holstebro, hevur mikudagin 30. mai lokið prógv sum kontorassistent hjá Scanplast í Holstebro í Jylland, DK.

Rasmus C. Effersøe 150 ár:

# Við grøvina hjá R.C. Effersøe



*Við grøvina hjá Rasmusi Effersøe, f.v. Jens Marius Poulsen, býráðsskrivari, Jákup Lindesskov, skrivari í eldraráðnum í Tórshavnar kommunu og formaður í Losjuni í Havn, Heðin Mortensen, borgarstjórin í Tórshavnar kommunu, og Tórbjørn Mikkelsen, formaður fyri Felagsnevnd Fráhaldsfelaganna*

Mikudagin 30. mai vóru liðin 150 ár síðan Rasmus Christoffer Effersøe varð føddur. Í hesum sambandi var ein minnisløta við standmyndina av honum á Tinghúsvøllinum í Havn, har løgtingsformaðurin og borgarstjórin í Tórshavnar kommunu hilda røðu og løgdu blómur við standmyndina. Eisini var vitjað við grøvina hjá Rasmusi Effersøe í kirkjugarðinum við Velbastaðvegin, har blómur eisini vórðu lagdar.

Rasmus Effersøe var framburðsmaður og var við í nógvum átøkum og við til at stovna ymisk feløg, sum í síni samtíð vóru við til at bøta um samfelagsviðurskiftini, eitt nú Sjúkrakassan í 1886 og Havnar Avhaldsfelag í 1878. Hann var landbúnaðarráðgevi frá 1889 til 1916 og løgtingsmaður fyri Suðurstreymoyar valdømi frá 1897 til 1901.

Rasmus Effersøe varð føddur í Trongisvági tann 30. mai 1857 og doyði í Tórshavn tann 23. mars 1916.

**mg**

# Eitt 40-ára skótaminni



*KFUK-skótar á legu á Hvítusunnu fyri 40 árum síðani á Glyvursnesi. Genturnar eru f.v.: Katrin Skála (Jacobsen), Ingun Lambaa, Katrin Næss (Simonsen), Nicolina Sørensen, Bente Kristoffersen (Kjær), Anna Hansen (Poulsen), Bergljót Debes Hentze og Hildur Patursson. Myndina tók Hedvig Poulsen*